## Hvalur skal hava frið

Bóghvítuhvalurin, sum heldur til úti fyri amerikonsku og kanadisku vesturstrondini, verður so illa órógvaður av ferðafólki, at nú vilja vísindafólk hava eitt serligt øki, har hvalurin kann fáa frið. Kanningar, sum eru gjørdar millum kanadisku oynna Vancouver Island og ta amerikonsku St. Juan Island, vísa, at nú eru bara 87 bóghvítuhvalir eftir har, og at hesin parturin av stovninum er í vanda fyri at doyggja út. Hvalurin har livir millum annað av laksi, men bátar við ferðafólki og stuttleikafiskimonnum gera, at hvalurin fær ikki frið. Tí mæla vísindafólkini til at geva hvalinum eitt øki fyri seg sjálvan.




## Umval í Kroatia

Eingin endaligur vinnari varð funnin á forsetavalinum í Kroatia um vikuskiftið, og tí verður umval tann 10. januar. Bestu møguleikarnar at vinna tá hevur sosialdemokraturin Ivo Josipovic, sum fekk 32,4 prosent av atkvøðunum í fyrra umfari. Kappingarneyti hansara tann 10. januar verður uttanflokkamaðurin Milan Bandic, sum er borgarstjóri í høvuðsstaðnum, Zagreb. Hann fekk 14,8 prosent hesaferð. Bandic og Josipovic vóru floksfelagar, til Bandic valdi at halda fram sum uttanflokkamaður. Undir valstríðnum hava báðir lovað at virka fyri, at Kroatia kann fáa limaskap í ES. Tað kann henda í 2012.

# gna móttøku





*Konan og tær tríggjar døturnar vóru og tóku ímóti skiparnum Róðin Biskopstø, sum hevur verið burturi síðan 2. Juli*



*Hanus Hansen, reiðari er fegi um, at alt spældi so væl av. Hann rósar skiparanum fyri at hava gjørt gott arbeiði*



*Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag (v. m.) var umborð og heilsaði uppá skiparan, og har var eisini Ólavur Biskopstø, sumer beiggi Róðin Biskopstø og hin skiparin á Skálaberg*



*Jógvan Lydsersen, fyrstimeistari er fegin um at vera komin heim. Hann sigur, at tað var ein góð kensla, tá í Skálaberg kundi seta fulla ferð á heim*



*Bryggjan í Norðhavnini var stúgvandi full av bilum*

– Men russiski umboðsmaðurin slapp ikki umborð, og tað gjørdi russiski sjómanspresturin heldur ikki. Presturin vildi geva okkum lesnað umborð, men tað bar ikki til.

Jógvan Lydersen hevur bara gott at bera myndugleikans persónum, sum komu umborð.

– Teir vóru sera fyrikomandi, sótu millum okkara og royktu og drukku kaffi, sigur hann.

### Gott at loysa

– Tað var ein stórur lætti, tá ið dómurin fall, og teir fingu at vita, at skipið var leysgivið, men teir vistu framvegis ikki, hvat fór at henda. Skipspappírini komu umborð, men neyðugt var at bíða eftir øðrum loyvum frá myndugleikunum.

Seinastu vikuna lógu teir við bryggjuna.

– Tað var ein góð løta, tá ið vit loystu, og so sigldu vit við fullari ferð heim, sigur Jógvan Lydersen.

Fólkini eru við at fara í land aftur, tí menninir umborð hava mest brúk fyri at koma heim. Skyldfólkini eru við at dragsa sekkir og annað hjá teimum í land.

### Burturi næstan hálvt ár

– Stundir vóru kortini at gera eitt støkk upp á brúnna at heilsa uppá skiparan Róðin Biskopsstø.

Hann er við at rigga av, stendur við farteldluni undir arminum.

– Tað er ein ótrúliga stórur lætti at vera komin heim. Vit hava verið undir einum ótrúliga stórum trýsti, sigur Róðin Biskipstø, ið sum ákærdur var undir størsta trýstinum.

– Tað var eitt stórt trýst í so langa tíð ikki at sleppa í land. Haraftat fingu vit nóg illa tað, sum okkum tørvaði. Og vit kendu okkum ótryggar, tí vit vistu ongantíð, hvat tað næsta fór at verða.

– Lagið á monnum batnaði nógv, tá ið dómurin var fallin, og teir vistu, at nú kundi ikki ganga long tíð, til teir kundu loysa.

Róðin Biskopstø tykist sjálvsagt eitt sindur móður eftir hesa drúgvu ferð, men lagið er gott. Hann hevur verið umborð síðan 2. juli, og teir vóru bara eina ferð, í november, inni og landaðu.

**– Fert tú yvir aftur til Russlands?**

– Jú, men ikki beint nú. Fyrst av øllum fari eg heim til foreldrini, sum hava koyrt ræst kjøt í ovnin, sigur Róðin Biskopstø.

Tá ið hann henda dagin fór í land, var hann leysur við skipið.

### Óvæntað móttøka

Hann er bilsin av tí stóru móttøkuni, sum um teir vóru hetjur.

– At so nógv fólk tóku ímóti mundi neyvan bara koma av, at Skálaberg varð tikin og noyddist at vera so leingi í Murmansk. Tá ið Skálaberg sigldi inn um pollin, var hetta allarhelst seinasta ferðin, at Skálaberg var á Klaksvík.

Stóri trolarin er á veg úr flotanum. Í dag er farið undir at leggja veiðuna upp, og tá ið tað er gjørt, og ymist er riggað av, fer Skálaberg yvir á aðrar hendur.